**Bill Justinussen**
**løgtingsmaður**

**Broytingaruppskot**

**til**

**2. viðgerð av**

**løgtingsmáli nr. 155/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi** (Flyta kvotur yvir um ár)

**B r o y t i n g a r u p p s k o t**

§ 1, nr. 1 verður orðað soleiðis:
"Í § 39, stk. 4, 1. pkt. verður "upp til 10% av egnari árskvotu sambært §§ 14-18, § 28 og § 34 kunnu flytast" broytt til: "ikki fiskaður partur av egnari egnari árskvotu fyri 2018 sambært §§ 14-18, § 28 og § 34 umframt ikki fiskað menningarkvota latin í 2018 kann eftir umsókn flytast"."

**Viðmerkingar:**
Skotið verður upp at avmarka vavið av uppskotinum soleiðis, at egin árskvota og menningarkvota bert kunnu flytast yvir um ár frá 2018 til 2019. Ein nýggj samgonga kemur at taka støðu til, um generella heimildin, sum er í upprunauppskotinum, skal vera galdandi áseting framyvir, ella um slík heimild bert skal verða latin landsstýrismanninum fyri eitt ár ísenn. Við broytingaruppskotinum fær flotin rætt til at fiska óveidda kvotu fyri 2018 í 2019.

**Á Løgtingi, 29. apríl 2019**

Bill Justinussen